FYLGISKJAL 7

LM-065/2025

**Alda Joensen**

**Fra:** Palllistafelag Føroya <palllist@palllist.fo>
**Sendt:** 3. november 2025 23:52
**Til:** Almanna- og mentamálaráðið
**Emne:** Pallistafelag Føroya - Hoyringssvar 1.nov 2025
**Vedhæftede filer:** HOYRINGSSVAR - Palllistafelag Føroya 01.11.2025.pdf

Góðu tit,

Vit taka væl undir við tykkara uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m

Viðheft er okkara hoyringssvar.

Takk fyri høvið.

Blíðar heilsanir,

Palllistafelag Føroya

PALLLISTAFELAG FØROYA

LM-065/2025

**HOYRINGSSVAR**

**Pallistafelag Føroya 1.nov 2025**

Við hesum verður takkað fyri høvið at ummæla *"Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m."*

Pallistafelag Føroya tekur undir við ætlanini at flyta "stuðulin til yrkispalllist" til Mentanargrunn Landsins at umsita. Skipanin við einari faknevnd fyri palllist, við tveimum ráðgevum við formligum førleikum og viðkomandi fakligum royndum, frá ávíkavist Palllistafelag Føroya og Leikarafelag Føroya, er skilagóð.

Eftir okkara tykki kann hetta tryggja, at metingarnar undir tilmælunum til nevndina hjá Mentanargrunni Landsins, verða fjølbroyttar og fakliga væl grundaðar, og at tey palllistarligu dygdareyðkennini fáa ta raðfesting tey hava uppiborið.

Harafturat er hendan nýskipan eisini yvirskipað við til at fevna betri og breiðari allar teir listarligu tættirnar sum við tíðini hava ment palllistarliga umhvørvið í Føroyum. Fleiri nýggj palllistafólk, við nýggjum spennandi útbúgvingum innan eitt nú dans og sang, tónleik og sjónleik eru løgst afturat seinnu árini og hava latið upp fyri nýggjum formatum og nýggjum upplivingum innan føroyska palllist. Skulu framførslu-umhvørvið og føroyska áskoðarafjøldin fáa gleði og gagn av hesum nýggju føroysku palllistafólkunum, krevjast góðir palllistarligir stuðulskarmar og -skipanir sum megna at lofta teirra førleikum og menna teirra møguleikar.

Palllistafelag Føroya fegnast serliga um ætlaðu broytingarnar av orðingum í lógini, sum konsekvent breiðka smala hugtakið "leiklist" (skuespilkunst) til tað breitt fevnandi hugtakið "palllist" (scenekunst). Hesar uppløgdu broytingarnar skapa við heitum sum t.d. "Palllistaráðið" og "Stuðul til yrkispalllist" ein meira rættvísandi samanhang, millum sjálvan lógartekstin, upprunaliga andan í lóg um Tjóðpall Føroya, og endamál og virksemi hjá Tjóðpalli Føroya sambært lógini og hennara viðmerkingar.

Eftir okkara tykki fer hendan skipan, og hesin hugburður, tessvegna eisini sum frálíður at virka fyri betri fakligari breidd og størri listarligari dygd innan føroyskari palllist sum heild. Við at fagna fjølbroytninum í okkara pall-yrkisliga umhvørvi, kunnu vit saman mynda og menna føroysku palllistina í framtíðini.

Vegna nevndina í Palllistafelag Føroya,

Annfinnur Heinesen

PALLLISTAFELAG FØROYA